

# Essa, ein vinur Ísraels farin

Seinasta sunnudag varð kendi havnarmaðurin, Elieser Arge, borðin út úr Ebenezer í Havn, 82 ára gamal.

Essa var merkismaður burturav. Best kendur sum dugnaligur skurðlækni á Landssjúkrahúsinum í mong ár. Eisini var hann kommunu- og landspolitikari, umframt fleiri álitisstørv sum hann røkti.

Í hesum fáu minningarorðum, minnast vit hann sum ein hollan vin Ísraels. Essa var formaður í felag okkara, Vinir Ísraels í Føroyum, í 6 ár.

Sum tann heiðursmaður hann var, røkti hann hetta starv til lítar, og gjørdi mong góð og mennandi átøk fyri hetta lítla landið, Ísrael, sum hann var so góður við.

Sum flest øll vita, so hevur Ísrael allar tíðir verið noytt at berjast fyri lívinum. Landið hevur fingið mangar snuddir, men við góðari hjálp frá Gudi og góðum fólki, so er Ísrael á lívi dagin í dag.

Sum lækni, so var høvuðsuppgávan hjá Essa at hjálpa fólki, sum vóru í neyð av sjúku ella skaða, og her skaraði Essa fram úr.

Kanska var tað hesi íbornu evni og ynski, at hjálpa, sum eisini komu Ísrael til góðar.

Essa gekk persónliga millum fólk og fyritøkur og savnaði inn fíggjarligan stuðul til frama fyri Ísrael, og tað var ikki smápeningur sum hann megnaði at lívga við, har tørvurin var stórur.

Saman við Essa, í verkinum til frama fyri Ísrael, stóð kona hansara Lydia.

Vit hava stóra samkenslu við Lydiu, Honnu, Sigrid og teirra kæru, og ynskja at Gud Ísraels og okkara troystar tey, sum bert Hann er førur fyri.

Við hesum ynskja vit at lýsa frið yvir minnið um holla vin Ísraels, Elieser Arge.

**Felagið, Vinir Ísraels í Føroyum**

# Marjun Lamain

## (fødd Niclasen) farin

Marjun, ein av okkara vælkendu og virkisfúsu útisetum hevur eftir drúgva sjúkralegu lagt árarnar inn.

Vit hava kenst frá barnsbeini av, men tey seinastu árini hava vit eisini sitið í nevnd saman í føroyska kirkjuráðnum við Sámalskirkjuna í Kjøpinhavn, har hon var kassameistari. Marjun var stillfør, beinasom og fryntlig; hennara partur lá ongantíð eftir. Hon hevði sítt fasta pláss í kirkjuni, og var millum teir mest trúføstu kirkjugangararnar í tí føroyska kirkjuliðinum, sum eftirhondini er blivið rættiliga fáment, uttan tá ið serligar hendingar ella kirkjuligar høgtíðir eru.

Í nógv ár arbeiddi Marjun á skrivstovuni hjá Faroe ship í tí norðasta partinum av Kjøpinhavn, beint við har tann føroyska bátsmanningin "Tvøráturin" heldur til í dag. Í sjálvum Føroyahúsinum hevur hon við næstan hvønn týsdagsdøgurða verið føst sjálvboðin álitishjálp hjá leiðsluni. Hon var samvitskufull og álítandi í øllum felagsarbeiði, og hartil hevði hon stóran ans fyri skemti og alskyns mentunnartiltøkum millum útisetar.

Hon visti nógv um føroyskan skaldskap, serliga skyldmannin, Janus, sum hon við stórum brosi kundi fortelja nógvar humoreskur um.



*Marjun saman við ommudøturnum Elisu og Marjun*

Vit, sum sita í kirkjuráðnum fyri føroysku meinigheitina í Kjøpinhavn drýpa høvur í sorg yvir, at eitt heilhjartað fólk verður tikið frá okkum so tíðliga á lívsleiðini Vit fámentu útisetar kulsa, tí vit eru allir blivnir so fátækir. Vit hugsa nógv um tey avvarandi og lýsa frið yvir minnið um Marjuna.

**Vegna Føroyska Kirkjuliðið við Sámalskirkjuna, Thorsgade í Kjøpinhavn**

**Virgar T. Dalsgaard. kst. formaður**

# Minningarorð um Eirik Dam

## f. 1. sept. 1948 - d. 28. aug. 2007



Tung og óverulig vóru boðini, sum komu, at Eirikur var deyður, einans 58 ára gamal. Eirikur var sonur Lisu og Valdemar Dam úr Kvívík. Valdemar var frá Norðskála og Lisa er úr Kvívík. Tey fingu átta børn. Eirikur traðkaði sínar barnaskógvar í heimbygdini. Hann giftist til Streymnesar við Rannvá. Tey fingu fýra synir.

Í sínum ungu árum var Eirikur til skips bæði við føroyskum og norskum skipum. Hann gavst við sjólívinum og fór at arbeiða á landi. Tey seinastu árini fór heilsan at bila, og mátti hann tí gevast í føstum arbeiði.

Eirikur var virkin í politikki. Hann var uppstillaður fyri Sambandsflokkin og sat eitt tíðarskeið sum varamaður á tingi. Hann sat eisini í Hvalvíkar bygdarráði.

Eirikur var góður at heita á. Var altíð til dystin fús, tá ið á stóð. Á flaggdegnum og bygdastevnum var hann vanur at halda røðu. Røðurnar hjá honum vóru altíð væl úr hondum greiddar. Fólk fóru altíð ríkari heim, tá ið røðan var liðug. Til sjónleik skaraði hann framúr, og mong eru tey, sum stuttleikaðu sær ófórt, tá ið Eirikur var á pallinum.

Eirikur bleiv rættiliga sjúkur fyri uml. einum ári síðani. Eg og konan vóru og vitjaðu hann á Landssjúkrahúsinum. Tað var tann sami Eirikur. Byrjaði at skemta beinanvegin og práta um gamlar dagar. Men álvarsemi kom eisini fram, tá ið hann greiddi frá, at hann skuldi niður á Ríkissjúkrahúsið. Alt gekk væl, hann kom fyri seg aftur. Tá eg tosaði við hann seinni, lat hann væl at, men hann orkaði lítið, og legði so afturat: »Eg skal ikki klaga, eg eri frammi hvønn dag«. Tá ið eg kom norður at vitja, var altíð farið út á ruskplássið at vitja, tí har arbeiddi Eirikur nakrar tímar tveir dagar um vikuna. Hann visti altíð okkurt at práta um, ja fólkini vóru mong, ið løgdu leiðina út á bryggjuna, ikki minst fyri at hitta Eirik.

Saknurin er stórur, ikki einans hjá mær, men so sanniliga hjá øllum bygdafólkinum. Øll sakna Eirik, tí hann var ein sonn bygdamynd.

Tíðliga ein morgunin fyrst í desember fór eg ein túr eftir Oyrini. Eg mátti steðga á eina løtu, alt var so kvirt, øll ljósini í bygdini spegladust í ánni, víkin var so spegilsblonk, einans Halá hoyrdist í kvirruni. Eg hugdi niðan á heimið hjá Eiriki, tað var so óveruligt, at hann ikki var millum okkum longur. Tá komu mong góð minni fram fyri meg, um tær mongu hugnaligu løtur, vit høvdu saman, tær løtur takki eg tær fyri.

Eirikur gleddist um tær sonarkonur, hann hevði fingið, men ikki minst gleddist hann um abbabørnini, ið nú vóru komin. Árini, ið hann fekk saman við teimum, vóru alt ov fá. Tit hava mist ein góðan verfaðir og abba. Tann kærleika, ið hann gav tykkum, ja, tað veit eingin betur enn tit!

Góða Rannvá, Kristian, Valdemar, Jóhan og Høgni. Saknurin hjá tykkum er svárur, tit hava mist ein góðan mann og pápa. Hann gav tykkum ta umsorgan og allan tann kærleika, ið hugsast kann.

At Eirikur var væl kendur og væl lýddur av øllum, vísti tann stóri skari, ið fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fallið ei í fátt, men haldið á.*
*Harrin styrki tykkum á leiðini.*

Hvíl í friði.

**J.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Karolina Samulesen úr Haldarsvík**, vanliga nevnd Kalla, andaðist leygardagin, 90 ára gamul. Kistan fer av Mørkini í Haldarsvíkar kirku mikukvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Kallu kunnu lata Røktarheiminum á Mørkini eina peningagávu, konta í peningastovni.

Kistan við **Arnold Jacobsen** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í Betesda týsdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin kl. 12.30. Tey ið vilja minnast Arnold, kunnu lata eina gávu til Malta í Hirtshals, konto í peningastovnunum.

**Borghild Eliasen í Fuglafirði** andaðist á Landssjúkrahúsinum, sunnudagin, 83 ára gomul. Bønarhald verður í kappellinum mikudagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Siloa í Fuglafirði hósdagin klokkan 13.